

TÓMAR SENGUR

*Tá ið nýggja ellis- og røktarheimið í Vági stendur liðugt næsta vár ella tíðliga næsta summar, fara fleiri sengur at standa tómar, tí ráð eru ikki til at lata øll búfólkini flyta inn*

# IKKI RÁÐ AT TAKA BÚFÓLK INN Í ELLISHEIMIÐ Í VÁGI

**SPARING** **Hóast nýggja ellis- og røktarheimið í Vági verður liðugt næsta summar, fer tað at standa partvís tómt, tí tað eru ikki ráð til at taka so nógv búfólk inn, sum ætlanin var**

Áki Bertholdsen

Tá ið búfólk einaferð næsta ár flyta inn í nýggja ellis-og røktarheimið í Vági verða tað fleiri sengur, sum fara at standa tómar.

Tað er greitt, nú pusslispælið um sparingarnar hjá Nærverkinum í Suðuroy loksins liggur sum tað skal.

Nýggja ellis- og røktarheimið í Vági verður liðugt næsta vár, ella tíðliga næsta summar og har verður pláss fyri 24 búfólkum.

Men Nærverkið í Suðuroy skal spara so mikið nógv, at tað verður ikki ráð at fylla tað fyrrenn í fyrsta lagi í 2012.

### Seks pláss spard burtur

Mary í Garði, stjóri í Nærverkinum, staðfestir, at upprunaliga ætlanin um at spara 2,7 milliónir hjá Nærverkinum í Suðuroy, stendur við, hóast mikið rok var um hana fyrr í ár.

Men har tað upprunaliga var ætlanin, at alt skuldi sparast á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi á Tvøroyri, verður upphæddin nú býtt sundur ímillum heimið á Tvøroyri og nýggja ellis- og røktarheimið, sum verður bygt í Vági og sum verður liðugt næsta summar.

Sostatt er næstan helvtin av sparingini, sum skuldi verða á Tvøroyri, nú flutt til Vágs.

Upphæddin er nevniliga býtt, soleiðis at Suðuroyar Ellis- og Røktarheim á Tvøroyri skal spara 1,478 millión og nýggja ellis- og røktarheimið í Vági skal spara restina, ella áleið 1,222 millión.

Stjórin í Nærverkinum sigur, at ein upphædd á hesi støddini, sum skal sparast burtur svarar til áleið tað, sum tað kostar at hava trý búfólk búgvandi á einum Ellis- og Røktarheimi.

Men av tí, at heimið í Vági ikki letur upp fyrrenn á árið er hálvrunnið, rakar sparingin tvær ferðir so hart.

Hon staðfestir, at merkir, at sparingin fer at raka seks búfólk á nýggja ellis og røktarheiminum í Vági og sostatt verða tað bara 18 búfólk, sum sleppa inn á heimið í Vági, tá ið tað letur upp, hóast pláss er fyri 24 fólkum.

Hvussu støðan verður í 2012, veldst um politiska viljan til at hækka játtanina aftur.

*aki@sosialurin.fo*

**» Fleiri sengur fara at standa tómar**

## 8 FÓLK FÆRRI

Mary í Garði, stjóri í Nærverkinum, staðfestir, at ætlanin at niðurleggja øll átta tveymannakømrini á Suðuroyar Ellis- og røktarheimi næsta ár, stendur við.

Sostatt er framvegis greitt, at í seinasta lagi 1. januar í 2012 skulu øll átta tvímannakømrini verða gjørd um til eittmanskømur.

Tað merkir, at í 2012 verða átta búfólk færri á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimið, enn tað eru í dag og tað merkir so samstundis eisini, at í 2012 verður játtanin til heimið og starvsfólkatalið á heiminum eisini lækkað tilsvarandi.

Tað hevur áður verði nevnt, at verða átta búpláss færri á Suðuroyar Ellis- og røktarheimi, fer tað at kosta 15 fólkum starvi.

Munurin er bara, at nú verða uppsagnirnar framdar yvir eitt tíðarskeið upp á eitt ár ístaðin fyri í einum høggi, sum tað upprunaliga var ætlanin.

Hóast átta búpláss sostatt verða niðurløgd næsta ár, skal Suðuroyar ellis- og Røktarheim næsta ár ikki spara meir enn tað, sum svarar til trý búpláss.

Tað merkir, at á pappírinum kann heimið verða yvirmannað við starvsfólki aftur ímóti talinum á búfólki.

Nærverkið og leiðsla og stýrið fyri Ellis- og Røktarheimið, fara nú at tosa saman um, hvussu tey skulu fáa samanhang ímillum starvsfólkatal og búfólkatal.

Ein møguleiki er, at eru starvsfólkini ov nógv í tali afturímóti búfólkatalinum, verður kanska møguleiki fyri at taka fleiri fólk inn á heimið til umlættingar, enn vanligt hevur verið.

**» Næstan helvtin av sparingini, sum skuldi verða á Tvøroyri, er nú flutt til Vágs**

## STANDA FAST VIÐ SPARING

Tað elvdi til rok í summar, tá ið tað frættist, at umfatandi sparingar skuldu setast í verk hjá Nærverkinum í Suðuroy næsta ár.

Boðað frá frá sparingum upp á 2,7 milliónir á Suðuroyar Ellis og Røktarheimi og tað hevði kostað 15 fólkum starvið.

Samstundis skuldu átta tvímannakømur gerast um til eittmanskømur næsta ár og sostatt verða átta búpláss færri á heiminum.

Men tað merkir so eisini, at tilsamans verða átta ellis- og røktarheimspláss færri í Suðuroy, enn tað annars.

Sum tað sæst í hinum greinunum her á síðuni, stendur Almannaráðið fast um, at hesar sparingar skulu fremjast í Suðuroy.

Men ístaðin fyri at seta allar sparingarnar í verk á Ellis- og Røktarheiminum á Tvøroyri, verða tær nú býttar sundur ímillum heimið á Tvøroyri og nýggja heimið, sum letur upp í Vági næsta ár.